**Vespubit**

Vespubit er lítið vandamikið, tí talan er um sera lítla nøgd av eitri. Summi verða sera sjúk av vespubiti, men tað er oftast vegna ovurviðkvæmi.

Um ein verður stungin í hálsin ella í munnin, kunnu slímhinnurnar hovna, so ringt verður at anda.

Eitt vanligt vespubit verður viðgjørt við salmiakkløgi, alkoholi ella køldum baki. Staðdoyvandi salva ella smyrsl at linna pínuna við fæst í hondkeypi.

Um tann, ið bitin er, verður bleikur og illa fyri, verður svimbul, fær vaml o.s.fr., leita tá læknahjálp.

**Meira at vita um vespur**

Vespur eru annars áhugaverd djór, og tey sum vilja vita meira um teirra lívshátt, verða víst til hesar keldur:

**Hvepseeksperten**
www.hvepseeksperten.dk

**Hornissenschutz**
www.muenster.org/hornissenschutz/index.html

**Frøði**
Tíðarrit nr. 1, 2001
J.K. Jensen & D. Bloch
Náttúrugripasavnið



OKTOBER 2014

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Tórshavnar kommuna**
Postsmoga 32 · FO-110 Tórshavn
Telefon 302010 · torshavn@torshavn.fo

Mánadag-hósdag kl. 9-16
Príggjadag kl. 9-15

# Vespur



www.torshavn.fo

# Vespur

**Um summarið hava vespurnar nógv um at vera, tí tær skulu passa og fóðra avkomið, sum er klakt í vespabýlinum. Tað hendir seg hesa tíðina, at einstakar vespur av óvart koma inn í hús at leita eftir føði. Tær kunnu vera til nakað av ampa, men mett verður, at trupulleikin ikki er størri enn, at hvør einstakur sjálvur kann greiða hetta.**

Í handlunum fáast ymisk evni og amboð at týna vespur við, m.a. vespafellur, flugusmekkarar og ymisk spreyevni. Um tað hendir seg, at vespur alla tíðina eru í húsinum ella nógvar vespur eru í nærumhvørvinum, kann roknast við, at vespabýli er tætt við.

Um vespabýli er í húsinum ella á grundøkinum, er ikki ráðiligt at taka tað burtur uttan serkøna hjálp. Vespurnar leypa beinanvegin á, um onkur roynir at órógva ella oyðileggja býlið.

### Hvussu fæst samband við kommununa

Er staðfest, hvar eitt vespabýli er, kann fráboðast til Snarskivuna, tel 302010. Snarskivan setir seg í samband við týningarskipanina, sum síðani ringir aftur til fráboðaran at avtala vitjan. Bert ánarin av ognini ella umboðsfólk ánarans kann biðja um týning.

### Hvussu finnur tú eitt vespabýli

Vespur duga væl at verja býli móti vindi, veðri og óviðkomandi gestum. Eyðkend støð eru t.d. undir takúthangi, undir væðingum, á loftum, millum skins og hold, í hjøllum og grótlaðingum.

Býlið kann vera goymt inni í húsaklæðing ella ímillum steinar í eini grótrúgvu, og er staðið, har sum vespurnar flúgva út og inn, er ofta lætt at finna og staðfesta. Við úthurðar ella onnur støð, har ein vanliga kemur, er tað lætt at leggja til merkis, tí at tað í heilum eru sveimandi vespur á ferð.

Áðrenn miðjan juli sæst og merkist lítið til vespurnar, men sum býlið alsamt veksur, verða fleiri og fleiri vespur, og sum frá líður sæst ein javnur streymur av vespum, ið flúgva til og frá somu býlisinngongd.

### Hvussu týnt verður

Fyri at fremja týningina verður ongantíð gjørt inntriv ella atgerð á fastar konstruktiónir, bygningar o.a. Týningin fevnir um at spræna út eitur, tá býlið er staðfest. Tvinni sløg av eitri verða nýtt. Tað fyrsta er ein flótandi eiturløgur, sum alt fyri eitt drepur allar vespur uttan fyri býlið. Aftaná verður sprænt eiturpulvur inn í og uttan fyri býlið. Hetta eitrið virkar í fleiri dagar og drepur allar vespur í býlinum og allar tær vespur, sum vóru burturfrá, meðan týningin fór fram.

Fáar tímar seinni eru allarflestu vespurnar deyðar. Vísir tað seg, at ikki gekk sum ætlað, og at býlið ikki er rakt í fyrstu atløgu, ber til at biðja kommununa endurtaka viðgerðina.

Skaðar ella ampar av týningini eru fyri egnu ábyrgd ánarans.

Eiturpulvurið luktar eitt sindur av svávuli, men roykurin hvørvur eftir fáum døgum.

Eiturpulvur, ið treingir inn orsakað av lekum í konstruktión og bjálving, má ánarin/fráboðarin sjálvur taka burtur. Pulvurið er ikki eitrandi fyri menniskju og djór í teimum nøgdum, sum nýttar verða.

Eiturpulvurleivdir á veggjum og túnum kunnu vaskast av tá eitt samdøgur er farið.

## UM EITUREVNINI

**Pyrethrin**
Insektevni nr. 179-3. Góðkent við kunngerð um týningarevni frá Umhvørvismálaráðnum/ Miljøministeriet.

**Malathion**
Insektevni nr. 179-20. Góðkent við kunngerð um týningarevni frá Umhvørvismálaráðnum/Miljøministeriet.

### Treytir fyri týning

Fyri at kunna fremja týningina nøktandi og munadygt setir kommunan tvær treytir, sum skulu lúkast.

1. Ávísast skal eitt býli ella eitt stað, har vespurnar áhaldandi flúgva inn og út. Týnarin átekur sær ikki at týna og drepa einstakar flúgvandi vespur.

2. Fráboðarin ella annar av ánaranum heimilaður persónur skal vera inni/heima, meðan týningin verður framd. Eiturpulvur verður sprænt inn í og uttan um býlið.

   Um býlið t.d. er millum skins og hold, og tað kann leka inn í búrúmini, tá sprænt verður, má onkur vera inni og siga frá, um eiturpulvurið treingir inn. Um so er, verður støðgað beinanvegin.



Vespabýlið